1 VINNINGU



Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Hetta er fyrstu ferð, vit halda henda ST-dag í Føroyum

Hetta gera vit fyri at undirstrika, at harðskapur móti kvinnum ikki verður góðtikin.

Tíðindaskriv

Vit skulu ikki so heilt langt aftur í søguna, eisini her í Føroyum, fyri at finna dømi um, at "harrafólkið" helt seg eiga heilt serlig rættindi hjá kvinnum, sum arbeiddu og tæntu hjá teimum. Komu hesar illa fyri og gjørdust við barn, vóru tað mangan tær, sum vórðu sektaðar, og ikki teir, sum brotsverkið framdu.

Frá tingsins røðarapalli hoyrast enn í dag patriarkalsk sjónarmið, sum vilja lasta kvinnurørsluni fyri líkt og ólíkt, júst tí vit hava stríðst fyri javnstøðu millum menn og kvinnur. Um patriarkalskir menn halda, at hjúnarlagnum bert er lív laga, um vit ikki hava javnstøðu, ja, so eru tað teir, ið hava ein trupulleika. Tíbetur eiga vit eisini røddir á tingi, ið tala at slíkum avoldaðum sjónarmiðum.

Kvinnur eru sjálvstøðug menniskju og ikki ogn hjá monnum.

Harðskapur er so nógv. Vit hava júst havt eitt avlagað orðaskifti um skrásett parlag. Várharra og bíblian vórðu nýtt sum amboð fyri at vísa, hvør hevði rættin á síni síðu.

Nú eri eg ikki serliga skriftkøn, men haldi meg minnast at Várharra segði, at ALT, sum hann hevði skapt var sera gott. Hann nevndi eingi undantøk; hvørki kvinnur ella samkynd. At samkynd ikki sleppa at liva sum tey eru skapt, og hava somu rættartrygd sum onnur, meti eg eisini sum harðskað.

So er tað prostitutión, sum jú eisini er harðskapur móti kvinnum

Í ovirmorgin verður triðja ráðstevnan hjá Norðurlandaráðnum um Trafficking in Women sett í Riga. Trafficking in Women er rætt og slætt søla av kvinnum (og børnum) til at nøkta avskeplaðan erotikk hjá ávísum monnum.

Fyrsta ráðstevnan var hildin í Tallin. Eg var boðin við sum limur av NOKS, sum er samstarvsfelag av norðurlendskum kvinnufeløgum undir Norðurlandaráðnum.

Orsøkin til at hava hesar ráðstevnur í teimum baltisku londunum er, at meðan tað áður serliga vóru kvinnur úr Asiu, sum vóru seldar á skøkjumarknaðinum, vísir tað seg í dag, at tað eru kvinnur úr Ruslandi og Baltisku londunum.

Eisini í Tallin blómaði henda vinnan. Tað fyrsta tú sást í taksabilunum vóru faldarir við sex-tilboðum av øllum sløgum. Har komu ferðaløg við norðurlendskum monnum júst í hesum ørindum, og vit fingu fortalt, at AIDS breiddi seg sum hundaland, tí teir norðurlendsku mennirnir vildu hava sex uttan hýt. Altso var tað við lívinum í veð.

Ringt var at fáa innivist fyri øllum luttakarunum til ráðstevnuna. Tá hotellini frættu, hvat slag av ráðstevnu hetta snúgi seg um, noktaðu tey at hýsa slíkum fólkum, tí tey sjálvi livdu av at hava skøkjur og erotiskan dans á hotellunum.

Vit skulu bara ikki halda at tað er so óhugsandi, at slíkt eisini kemur at floyma inn yvir Føroyar, um vit eitt nú fáa eina oljuvinnu. Tað kann eisini koma nóg fyrr, um vit einki gera.

Í Íslandi hava tey nú í fleiri ár sagt frá tí erotiska dansinum, sum hevur stungið seg upp har. Soleiðis byrjaði tað har. Úrslitið er at Ísland í dag hevur hópin av skøkjuhúsum; talið økist í heilum.

Vit krevja tí at tann erotiski dansurin, sum er sloppin framat í Føroyum, hóast hann er ólógligur, verður steðgaður og tað beinan vegin.

Vit mugu eisini lóggeva, sum tey nú hava gjørt í Svøríki í tílíkum málum:

Keyp av sex-tænastum er ólógligt, og er tað keyparin av sex-tænastum, sum verður sektaður. Líka mikið um hetta fer fram heima ella í øðrum landi.

Eg las í einum norðurlendskum dagblaði eftir ráðstevnuna, at ein norðurlendskur embætismaður, sum luttók á ráðstevnuni, var tikin við buksunum niðri - um eg so má siga - í einum skøkjuhúsi í Tallin. Hann var suspenderaður við brestin; tí tað var uppsagnargrund haðani hann kom.

Vit mugu krevja, at løggávan í Føroyum eisini kemur at umfata prostitutión.

Tí prostitutión er harðskapur móti kvinnum.

Altjóða leiðslan fyri Bahá'i tr'unni heitir á allar heimsins átrúnaðarleiarar um at køva átrúnarligar fordómar og fanatismu

Bahá'i samfelagið í Føroyum

Toftir 26. november 2002. Altjóða leiðslan fyri Baha'i-trúnni hevur sent øllum heimsins átrúnaðarleiðarum eitt bræv, har hon harmast um, at átrúnaðarligir fordómar framhaldandi forða fyri heimsfriði og framburði.

Bahá'i samfeløg um allan heim bera boðini til átrúnaðarleiðarar í teirra londum og senda tískil hesa áheitan um, at teir taka avgerandi stig til tess at beina fyri átrúnaðarligari intoleransu og fanatismu. Hetta brævær eisini handað fleiri av prestunum her í Føroyum hesar seinastu mánaðirnar.

"Fyri hvønn dag, ið gongur, veksur vandin fyri, at alt fleiri smærri logar av átrúnaðarligum fordómum fara at kynda ein heimsumfatandi stóreld, og avleiðingarnar av honum er tørført at ímynda sær," skrivar Alheims Hús Rættvísunnar í brævinum, sum heilt einfalt er stílað til "Heimsins Átrúnaðarleiðarar" (Alt brævið stendur at lesa á heimasíðuni: http://www.bahai.fo/skriv/)

"Tað er syndarligt, at skipaður átrúnaður, sum er til fyri at tæna bróðralagi og friði, alt ov ofta sær út til at vera mest ræðuliga forðingin á vegnum; eitt dømi er tann serliga nívandi sannroynd, at hann leingi hevur lænt fanatismuni sitt trúvirði", staðfestir ráðið í áheitanini. "Sum leiðsla fyri einum av heimsins trúarbólkum kenna vit ábyrgd fyri at eggja øðrum til álvarsliga at umhugsa ta avbjóðing, hetta er fyri átrúnaðarligar leiðslur."

Alheims Hús Rættvísunnar er fólkaræðisliga valdað altjóða ráðið, sum leiðir altjóða Baha'i-samfelagið, ið telur 5 mill. limir.

Evnið í brævinum bendir á ta merkisverdu menning í farnu øld, ið ger, at fordómar grundaðir á kyn, rasu og tjóðskap ikki longur kunnu góðtakast av nakrari hugsandi menniskju. Hóast teir kortini halda fram við vera til, so er ein sterk rørsla fyri at beina teir av vegnum. Men átrúnaðarligir fordómar standa við og birta uppundir kreppu, stendur í brævinum, sum átti at fingið átrúnaðarleiðarar at "slitið seg leysar av fortíðini eins væl og tey, sum skaptu møguleika fyri, at samfelagið fór í holt við teir líka so undirgravandi fordómarnar móti rasu, kyni og tjóðskapi."

Í áheitanini bjóða Baha'i samfeløgini seg fram til at hjálpa til við arbeiðinum fyri átrúnaðarligum samljóði, so sum felagskirkjuliga rørslan hevur royndt, og leggja at enda afturat: "Vit skylda okkara samstarvsfeløgum í hesi felags roynd klárliga at staðfesta okkara sannføring um, at ætlar felagskirkjuliga stevnan sær at gera nakað týðandi fyri at lekja tær líðingar, sum pína eina vónleysa mannaætt, so má hon nú erliga og uttan meira uttanumtos boða tann boðskap - tann yvirskipaða sannleika, ið kveikti rørsluna í sínari tíð: at Gud er hin sami og hóast allar menniskjansligar tulk.-ingar, so er trúgvin eisini hin sama."

(Lagað eftir grein, sum Altjóða Bahá'isamfelagið hevur skrivað)

Svimja um Vestmannasund

Svimjing
Evald Rasmussen skrivar:

Svimjing um Vestmannasund sunnudagin 8. des. 2002.

Nú Vágamenn skulu gjalda nógv fyri at ferðast inn á meginlandið gjøgnum undirsjóartunnilin, funnu teir upp á tey ráð, at renna gjøgnum holið ístaðin. Hetta er eitt sera gótt tiltak, sum uttan iva verður afturvendandi.

Maðurin aftanfyri Nólsoyarsvimjingina, helt at stuttligt hevði verið at svomið um sundið, Nakað, sum bara verður gjørt einaferð, og vónandi vera nógv, ið taka undir við tiltakinum

Nakrir av royndu Nólsoyarsvimjarunum hava longu boðað frá, at teir ætla sær við, og spennandi verður at síggja, hvør verður fyrstur at seta fótin á Vágalandið.

Byrjað verður Streymoyarmegin, nakað sunnan fyri Egilsnes við Vestmanna, og verður svomið yvir á Oyragjógv, teinurin er einar 1100 metrar.

Málið er ferjulegan á Oyragjógv. Kemu tú á land áðrastaðni mást tú renna seinasta teinin.

Svimjarar og bátsmenn skulu møta við bátabrúgvarnar sunnudagin 8. 12 kl. 10.

Kyrrindi eru í Vestmannasundi kl 11:50, og kl 11:30 verður startskotið latið av og svimjararnir kunnu leggja á sundið.

Krøvini til trygd eru tey somu sum til Nólsoyarsvimjingina:

1. Hvør svimjari hevur ein bát at fylgja sær, hesum syrgir hann sjálvur fyri.
2. Í bátinum eru ein skipari og ein hjálpari.
3. Svimjarin skal vera í rímiligari venjing.
4. Svimjarin skal svimja í vátdrakt.

Tey ið ætla sær við, kunnu melda til hjá Erlendi Simonsen á teldubúðstaði: erlendur@post.olivant.fo

Framhald frá síðu 13

Sum nevnt eru serlig atlit at taka, um ein er rúsevnismisnýtari. Rúsevnismisnýtarir, sum sproyta seg, mugu ansa eftir ikki at nýta brúktar nálir, tí HIV virus kann sita á tí dálkaðu nálini, og tá er vandi fyri at blíva smittaður.

Hvat er ein HIV-roynd?

Ein HIV-roynd er ein blóðroynd, sum vísir um ein hevur andevni móti HIV-virus í kroppinum.

HIV-royndin gerst positiv í fyrsta lagi 4 – 12 vikur eftir, at ein er smittaður. Royndin kann takast anonymt, t.v.s. at einum nýtist ikki at upplýsa navn ella føðingardag.

Fyrimunurin við einari HIV-roynd er tann, at ein fær vissu fyri, um ein er smittaður ella ei. Ein hevur tá møguleikan at koma tíðliga í viðgerð.

Vansin við einari HIV-roynd er tann, at ein, um hon er positiv, noyðist at liva við vitanini um at vera smittaður við einari lívsfangari álvarsligari ígerðarsjúku.

Hvar kann ein fáa meira at vita um AIDS og HIV-smittu?

Fyribyrgingarráðið svarar øllum spurningum um HIV-smittu og AIDS. Vit hava telefon 315155; um ringt verður eftir arbeiðstíð, er telefonsvarari, sum vísir til annað nummar. Eisini ber til at senda t-post til fyribyrg@kallnet.fo.

Kommunulæknarnir svara eisini øllum spurningum um AIDS og HIV-smittu eins og um heilsu og fyribyrging annars. Á alnótini finnst ein ørgrynna av góðum heimasíðum um eyðkvæmi og HIV.

Sum dømir kunnu nevnast: http://www.netdoktor.dk og http://www.aidslinien.dk

Hesar heimasíður hava allar leinkjur til aðrar heimasíður, so ein kann leita víðari runt í verðini.

Hví er tað so umráðandi við upplýsing av júst hesari sjúkuni?

Hóast vit, sum nevnt, onganeyðkvæmistilburð hava havt seinastu árini, so er HIV-smittu og eyðkvæmi potentielt ein stór hóttan. Um fólk gerast minni varin viðvíkjandi teirra kynslívi, er vandi fyri, at talið av tilburðum fer at økjast skjótt og nógv.